# Spæligleðin er í topp

**All That Rain er rættiliga komið fyri seg, eftir at teir skiftu sangara í bólkinum fyri einum ári síðani, og í bólkinum halda teir, at teir ongantíð áður hava verið betur fyri**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Seinasta árið hevur rockbólkurin All That Rain skula fóta sær, eftir at Jens Marni Hansen, sum hevði týðandi leiklut í bólkinum, fór burturúr.

Fyrstu tíðina royndu teir seg fram við nýggja sangaranum, Hans Ravnsfjall, men tað kendist trupult at skifta út í bólkinum.

– Tað var tungt at koma í gongd við nýggja sangaranum, tí vit høvdu í fleiri ár arbeitt so tætt saman við Jens Marna, at tað kendist sum at missa ein familjulim, tá hann fór burturúr, sigur Henning Nicodemussen, trummusláari.

### Komnir fyri seg

– Men vit yvirlivdu truplu byrjanina, og nú er støðan í bólkinum betur enn nakrantíð áður. Spæligleðin er í topp, og Hans hevur rættiliga funnið sítt pláss í bólkinum. Hann tekur okkum ferð eftir ferð á bóli, sigur Henning.

Tey, sum hava verið til framførslurnar hjá All That Rain í summar, kunnu eisini vátta, at bólkurin hevur verið á toppinum til hesar framførslur.

Men bólkurin er í løtuni merktur av, at tveir av tónleikarunum eru í læru og skulu á skúla uttanlands. Henning var fyrr í ár niðri í fleiri mánaðir, og seinni í ár verður Hans Ravnsfjall burtur í 25 vikur.

# Fløgan hjá Clickhaze gevast út í Danmark

**Ætlanin er, at Cope Records skal geva fløguna hjá Clickhaze út í Danmark í august mánaði, og víðagitið amerikanskt tíðarrit sýnir føroyska bólkinum áhuga**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Konsertferðin hjá Clickhaze til Danmarkar í summar kastar nú nakað



*Vaksandi áhugi er fyri Clickhaze uttanlands*

ítøkiligt av sær. Føroyski bólkurin fer eftir øllum at døma at gera avtalu við Cope Records um, at danska felagið fer at selja EP-fløguna hjá bólkinum í Danmark.

Fregnir veit at siga, at áhugin er stórur fyri Clickhaze uttanlands. Útvarpsstøðin P3 hjá Danmarks Radio er farið at spæla sangin Daylight, og hann kemur møguliga á danskan hitlista í næstum. Hesin sangur er í løtuni best umtókti sangurin á 15 teimum bestu hjá Útvarpinum.

Kenda amerikanska tónleikablaðið Billboard hevur boðað umboðsmanninum hjá Clickhaze, Sólarn Solmunde, frá, at blaðið fer at skriva eina grein um føroyska rockbólkin í næstum.

Næsta ár skal Clickhaze spæla á Hullsfred festivalinum, sum er tann størsti í Svøríki.



*Sigrið Rasmussen sleppur rættiliga at royna seg, nú hon skal byrja á sangskúla í London í heyst*

# Sigrið sloppin á sangskúla í London

**Sigrið Rasmussen verður fyrsti føroyingur á sanglinjuni á Thames Valley University**

TÓNLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*

Songkvinnan Sigrið Rasmussen fer í september at byrja á forkunnugum sangskúla í London. Talan er um Thames Valley University, har hon er sloppin inn á sanglinjuna.

### Sjey ár í Noregi

Seinastu sjey árini hevur Sigrið búleikast í Noregi. Hon gjørdist rættiliga kend, tá hon eitt skifti var ein av limunum í popp-bólkinum Grace. Lívið við Grace gjørdist stokkut, tí í 2000 fóru limirnir í bólkinum hvør til sítt.

Í Noregi fór stórur partur av tíðini hjá Sigrið við sangi, har hon var nógv at síggja í norska gospelumhvørvinum.

Sigrid hevur sungið nógv við kórinum, Norwegian Gospel Voice, og umframt í kóri, hevur hon sungið í kirkjum og samkomum, og ofta varð Sigrið biðin um at vera gestatónleikari til ymisk tiltøk.

### Gleðir seg at koma til London

Sigrið verður fyrsti føroyingur, ið fer at royna seg á sanglinjuni á Thames Valley University.

Sangskúlin byrjar 25. september, og hon væntar sær nógv av útbúgvingini.

– Eg eri øgiliga spent um, hvat skúlin fer at geva mær tónlistarliga, sigur Sigrið við Sosialin.

Eisini gleðir Sigrid seg til stórbýarlívið í London, og sum hon sjálvur sigur, so er London eitt knútapunkt, við óteljandi møguleikum.

Árliga verða 24 næmingar tiknir upp á sanglinjuna á Thames Valley University, og í ár eydnaðist tað so havnarkvinnuni Sigrið Rasmussen at sleppa inn. Hon var til upptøkuroynd í London, har hon skuldi vísa sín sangførleika, og at ástøðiligi kunnleikin eisini var nøktandi. Umframt sanglæru, skal Sigrið hava frálæru í ljómborðspæli og violin.

Sanglæran fevnir um allar sjangrur, alt frá hørðum rokki til gospeltónleik. Eisini er frálæra um nýggja teldutónleikin.

Skúlin leggur stóran dent á tað verkliga, og hann er ikki so tengdur at ástøðiliga partinum, sum vit eitt nú kenna frá eitt nú konservatoriunum. Útbúgvingin er skipað á tann hátt, at eftir trimum árum fært tú útbúgving á bachelor-stigi í popular music and performance, og síðani eru møguleikar at fara víðari til master-útbúgvingina.

Sjálv vónar Sigrið Rasmussen, at skúlin fer at betra hana sum sangara og tónleikara.

### Konsert leygarkvøldið

Leygarkvøldið fara Sigrið Rasmussen og Gunnar Guttesen at spæla í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Konsertin er partur av summartónum og byrjar kl.19.30. Sigrið og Gunnar hava spælt nógv saman áður, og leygarkvøldið verður so enn ein møguleikið at hoyra tey syngja og spæla saman.

Konsertin verður fjølbroytt, bæði við popp- og gospeltónleiki.




Føroya Fiskimannafelag

## Eftirlønarskipan hjá fiskimonnum

Samb. avtalu millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag byrjaði inngjalding til eftirlønarskipan hjá fiskimonnum 1. juli. Gjaldið er í fyrsta umfari kr. 25 pr. dag. Av hesum rindar fiskimaðurin kr. 10.

Gjørd er avtala millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Banka um, at bankin skal umsita skipanina, og at hann innan rammur, sum skulu avtalast við fiskimannafelagið, skal fáa mest møguligt avkast av inngoldnu upphæddunum.

Tískil er grundarlagið fyri skipanini avtalan við Føroya Banka. Um einstakir fiskimenn kortini ynskja sína samansparing aðra staðni, sum møguleiki er fyri, skal Føroya Fiskimannafelag hava fráboðan um hetta.

**Føroya Fiskimannafelag**

## Fólk søkist at gera reint

Vegna farloyvi í 1 ár verður søkt eftir fólki at gera reint í Tofta skúla. Reingerðin er 23,75 tímar um vikuna frá 01. september at rokna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir verða at senda til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 07.08.2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Nes kommunu, tlf. 266386 millum kl. 10.00–12.00.

**Nes kommuna**

## Tilboð

Tilboð ynskist uppá fínplanering og stoyping av dekki- og garði um umhvørvisplássið í Oyndarfirði.

Víddin er 16 x 8 m (128 fermetrar).

Vatn og brunnur við frárensli er lagt inn á økið.

Møgulig tilboð mega verða kommununi í hendi í seinasta lagi 20. aug. 2002

**Oyndarfjarðar kommuna**

Sosialurin
-tað loysir seg

## Pedagogur til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 1 pedagogi til barnagarðin 30 tímar um vikuna til at byrja 15. september 2002.

Á stovninum eru 2 vøggustovur og 4 barnagarðsstovur við 12 børnum á hvørjari stovu.

Um eingin pedagogur søkir, eru onnur, sum hava áhuga, vælkomin at søkja starvið.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 10. august 2002.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara, á tlf. 319019 ella 219019.

## Summarfrí

**22. juli – 16. august**

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 22. juli til fríggjadagin 9. august, báðir dagar íroknaðir.

Møguligt er at seta seg í samband við bilasøluna á fartelefon 210101 og 210505.

Vit ynskja viðskiftafólki okkara eitt gott summar.

**Sp/f Norðbil**
Postsmoga 1070 · FO-110 Tórshavn
Tel. 313707 · Fax 310855 · www.nordbil.fo

## Bátur til sølu

Um hóskandi boð fæst.

Aqua Star 38 við fiskiloyvi 5 D.
Motorar: 2 x 240 HK, ferð 18 míl.
Alla vanliga nautiska útgerð.
Línuspæl.
Eisini útgjørdur til snelluveiðu.

**Tlf. 45 60 26**

## Hygg her

Hví pussa og mála, tá ið tú kanst gera bæði í somu arbeiðsgongd.

Skalcem puss og betongmáling.

Nærri fæst at vita við at ringja á

**tlf. 455775**
Arne Samuelsen
Heygavegur 11 · 700 Klaksvík

**Fiskimálaráðið**
*Skipaeftirlitið*

## Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir hervið eftir einum skipaeftirlitsfólki til setan 1. oktober ella skjótast til ber.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- at hava um hendi tekniska málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkið við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o. ø. feløgum ella persónum, sum hava myndugleika ella eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar

**Førleikakrøv:**
- Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tað er somuleiðis krav, at umsøkjarin hevur minst 5 ára starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring).

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður sett sum eitt krav, um hetta ikki er lokið.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 1. august 2002, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
Postsmoga 112
110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.